Landssjúkrahúsið



# Børn og doyving
# Kunning til foreldur

Børn og doyving
Barnið skal fasta við skurðviðgerð………………………..…………………3

Kravið viðikjandi at fasta er
Áðrenn skurðviðgerð……………………………………………………………4

Hvør er leikluturin hjá foreldrunum?
Doyving
Ymiskir hættir verða nýttir, tá børn verða doyvd………………………5

Pínuviðgerð eftir skurðviðgerð
Hava til spurningar………………………..…………………………..………6

Keldur……………...……………………………………………………………….7

## Børn og doyving

Í hesum faldara kunnu tit sum foreldur lesa, hvat skal henda, tá barn tykkara skal doyvast til skurðviðgerð.

Vanligt er at møta á Landssjúkrahúsinum sama dag, sum skurðviðgerðin fer fram. Men hava tit langan veg at ferðast, er møguleiki fyri, at barnið saman við øðrum foreldrinum verður innlagt dagin fyri.

Annað foreldrið fylgir barninum allan vegin, til tað er sovnað inni á skurðstovuni.

Anestesilæknin kunnar seg um heilsuna hjá barninum við m.a. at lesa journal, og er annað at spyrja um, tosar hann eisini við tykkum foreldur og barnið, kann tað svara fyri seg.

- Tað, ið hevur týdning fyri doyvingina, er um barnið hevur verið doyvt fyrr, og hvussu tað gekk tá
- er ovurviðkvæmt fyri onkrum
- hevur onkra kroniska sjúku, sum t.d. diabetes, astma ella bronkitis.
- er í viðgerð við onkrum heilivági
- hevur krím
- hevur leysar barnatenn

## Barnið skal fasta fyri skurðviðgerð

Tá ein verður doyvd/-ur geva allir vøddar seg, eisini magavøddarnir. Er magin ikki tómur fyri føðslu, er vandi fyri, at ósodnað føðsla og magasevja renna upp í vælindið og niður í lunguni.

Tað hevur tí stóran týdning, at reglugerðin niðanfyri um at fasta verður hildin.

## Kravið viðvíkjandi at fasta er:

Barnið skal verða fastandi (ikki eta) 6 tímar undan skurðviðgerðini.

Barnið kann drekka vatn, saft, sukurvatn, djús uttan fruktbitar 1 tíma undan skurðviðgerðini.

Børn, ið bert fáa bróstamjólk, kunnu í seinasta lagið fáa at súgva 4 tímar undan skurðviðgerðini.

Skurðviðgerð av børnum fer vanliga fram fyrrapartin.



## Áðrenn skurðviðgerð

Á barnadeildini fær barnið tablettir ella stikkpillarar, sum anestesilæknin hevur rátt til. Eisini fær barnið Emla-plástur (lokaldoyvandi) á handarbakið.

Brúkar barnið brillur ella hoyritól, skal barnið hava tey við á skurðgongina. Hetta ger samskiftið við barnið lættari.

Hevur barnið eina yndisleiku, kann hon takast við á skurðstovuna.

Barnið skal ikki hava neglalakk, smyrsl, ringar, hálsprýði, oyraringar ella tílíkt, tá tað skal skurðviðgerast.

Portørur koyrir barnið av barnadeildini til skurðstovuna.



## Hvør er leikluturin hjá foreldrunum?

Foreldur eru ofta eitt sindur fjálturstungin í sambandi við, at barn teirra skal doyvast. Børn tola vanliga væl doyvingina og koma skjótt fyri seg aftur. Starvsfólkið á anestesideildini hevur drúgvar royndir at doyva børn, og tí kunnu foreldur kenna seg viss um, at børnini eru í tryggum hondum undir skurðviðgerðini.

Heitt verður á annað foreldrið at fylgja barninum á skurðdeildina og vera hjá, tá barnið verður doyvt á skurðstovuni.

Fyrilit verður tikið fyri reinførinum á øllum skurðstovunum, tí fær foreldrið klæði at fara í, áðrenn farið verður inn á skurðstovuna.

## Doyving

Sjúkrarøktarfrøðingur tekur ímóti tykkum á skurðgongini og spyr um navn, føðingardag, ovurviðkvæmi v.m. hjá barninum, umframt hvørja skurðviðgerð ætlanin er at gera. At fáa somu spurningar settar fleiri ferðir kann verða eitt sindur ørkymlandi, men hesir eru neyðugir fyri trygdina.

## Ymiskir hættir verða nýttir, tá børn verða doyvd:

1. Doyvingin kann fara fram á tann hátt, at barnið gjøgnum eina masku andar sovimedisinið inn gjøgnum nøs og munn. Barnið sovnar eftir uml. 3-4 min.

2. Eitt tunt plastrør, vanliga nevnt dropp, verður lagt í hondina, og sovimedisin verður sprænt í droppið. Barnið sovnar eftir lítlari løtu.



Tá barnið er sovnað, fer foreldrið úr skurðstovuni og aftur á barnadeildina. Boð verða send á barnadeildina, tá skurðviðgerðin er av, og foreldrið verður biðið um at fara viðrakningarstovuna. Foreldrið kann sita hjá barninum, meðan tað vaknar. Hetta tekur vanliga 1 – 1½ tíma, og barn tykkara verður síðan koyrt í song aftur á barnadeildina.

## Pínuviðgerð eftir skurðviðgerð

Øll børn, ið eru skurðviðgjørd, verða pínuviðgjørd. Pínuviðgerðin kann vera ymisk alt eftir, hvør skurðviðgerð talan er um.

Pínuviðgerðin byrjar, meðan barnið er doyvt. Lokaldoyving verður sprænd runt skurðstaðið, eftir at barnið er sovnað, og virkar í fleiri tímar eftir skurðviðgerðina. Eisini verður pínustillandi sprænt inn í droppið, ið varð lagt í byrjanini av doyvingini. Harumframt verður Panodil í tablett-formi ella sum stikkpillari eisini givið eftir skurðviðgerðina.

Anestesilæknin metir um, hvør pínuviðgerð er hóskandi til júst ta skurðviðgerð, ið barn tykkara hevur fingið.

## Hava tit spurningar



Eru spurningar viðvíkjandi doyvingini av barni tykkara, kunnu tit umvegis sjúkrarøktarfrøðing á deildini fáa samband við anestesilækna.



Keldur

Børn og bedøvelse

Information til forældre Revideret marts 2008
Anæstesi - /Operationsenheden Juliane Marie
Centret

Rigshospitalet

Blegdamsvej 9

2100 København Ø

Vælkomin á Barnadeildina

Starvsfólkið á Barnadeildini januar 2009

Landssjúkrahúsið

J.C. Svabosgøta

100 Tórshavn

Leiðbeinandi tilfar frá Oyra-Nasa-Hálsdeildini

Landssjúkrahúsið

J.C. Svabosgøta

100 Tórshavn

Anestesideildin

Landssjúkrahúsið

J.C. Svabosgøta

100 Tórshavn

Elin H. Jensen, anestesiyvirlækni

Jonna O. Hansen, anestesisjúkrarøktarfrøðingur

Landssjúkrahúsið

tel 304500, www.ls.fo